gult cyan magenta svart



## Gólvsølan

**Góð 23 tons vórðu seld um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mikudagin. Niðanfyri verður sýnt, hvørjir bátar áttu veiðuna, eins og yvirlit er yvir, hvussu sølan varð býtt millum ymsu søluvørurnar**

| Syslun-ummar | Skipanavn | Reið-skapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 193 | MARNA | #N/A | 752 |
| FD 229 | CAMILLA | #N/A | 211 |
| FD 530 | NORÐSØKI | #N/A | 5.115 |
| FD 812 | GEIRHÓLMUR | LÍNA | 1.588 |
| KG 129 | BRATTABERG | LÍNA | 40 |
| KG 170 | ELJAN LÍNA | 178 | |
| KG 47 | HAVSBRÚN | LÍNA | 3.060 |
| KG 603 | SJÓFRÚGVIN | LÍNA | 68 |
| KG 640 | HANSA | SNELLA | 130 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 132 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 170 |
| TG 159 | VESTURBÚGVIN | SNELLA | 84 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 375 |
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 168 |
| TG 330 | VÍKINGUR | SNELLA | 267 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 297 |
| TG 420 | BÁRA-DRANGUR II | LÍNA | 1.196 |
| TG 514 | KELDAFOSSUR | LÍNA | 73 |
| TG 576 | SVANUR | LÍNA | 720 |
| TG 622 | VARÐIN | LÍNA | 225 |
| TG 808 | POUL S. | SNELLA | 268 |
| TG 95 | FLØTUNES | SNELLA | 189 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 4.385 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 254 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 40 |
| VA 132 | LÍV | SNELLA | 258 |
| VA 141 | ÁLKU-KLETTUR M/B | SNELLA | 498 |
| VA 164 | NIKLÁI | SNELLA | 181 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 262 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 312 |
| VA 251 | ELVIRA M/B | SNELLA | 67 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 162 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 38 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 683 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 106 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 359 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 90 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 241 |

| VoruNavn | kg |
|---|---|
| BROSMA 0 | 37 |
| HÝSA 1 | 19 |
| HÝSA 2 | 396 |
| HÝSA 3 | 823 |
| HÝSA 4 | 36 |
| HAVTASKA 0 | 3 |
| KALVI 4 | 1 |
| LIVUR | 22 |
| LONGA 0 | 8 |
| REYÐSPRØKA 0 | 3 |
| SIL | 405 |
| SKRUBBA | 35 |
| STEINBÍTUR | 7 |
| TOSKAROGN | 1.069 |
| TOSKUR 1 | 243 |
| TOSKUR 2 | 1.966 |
| TOSKUR 3 | 8.670 |
| TOSKUR 4 | 7.544 |
| TOSKUR 5 | 1.587 |
| UPSI 2 | 54 |
| UPSI 3 | 22 |
| UPSI 4 | 48 |
| UPSI 4&5 | 238 |
| ANNAÐ | 6 |

# Alingin stevnir móti eini umhvørvisvanlukku

ALING
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



Føroyi havbúnaðurin verður rikin eins fyrilitaleyst og bretski landbúnaðurin. Tað verður als ikki tikið fyrilit til umhvørvið. Sjúkur, eins ringar og neytaøði og munn og kleyvsjúka, liggja og lúra fyri framman. Hetta hóttir ikki bara alifiskin, men eisini villa fiskin undir Føroyum., heldur Jóhan Mortensen, vinnulívsmaður

-Landbúnaðarpakkin í fríhandilsavtaluni við ES er heilt vanvittigur. Eg haldi at avtalan við ES er ábyrgdarleys. Ringar djórasjúkur herja niðri á meginlandinum og ES avtalan hevur latið Føroyar upp fyri øllum, sum kann tæna kapitalinum á meginlandinum. Her er frítt at flyta livandi djór um landamørk,sigur Jóhan Mortensen, vinnulívsmaður.

Jóhan Mortensen, sum hevur fingist við at selja fisk meginpartin av lívinum er skelkaður yvir hvat hendir í Føroyum í hesum døgum. Hann skilir slett ikki, at landsdjóralæknin ikki tekur støðuna niðri á meginlandinum í álvara og setir fullkomiligt bann fyri øllum innflutningi av vørum, sum bara hava verið nærhendis landbúnaði í Bretlandi. Tað er eisini av týdningi at øll sum hava verið í Bretlandi, mugu verða sóttreinsað, áðrenn tey koma aftur til landið, heldur hann.

-Sjúkurnar niðri á meginlandinum koma av, at djór verða hópframleidd. Tey skulu vaksa so skjótt sum møguliga, viga so nógv sum møguligt, og tey verða so nógv strongd í hesi roynd, at tey gerast veik mótvegis sjúkum, sigur Jóhan Mortensen.

-Fáa vit munn og kleyvsjúku hendanvegin , er tað einki minni enn ein vannlagna fyri samfelagið. Men eg óttist eisini fyri, at tað fer at ganga galið á sjónum, so nógv sum alingin veksur í løtuni. Føroyski havbúnaðurin verður rikin eins hart og náðileyst sum bretski landbúnaðurin og tað skal ikki undra meg, um vit í framtíðini fara at fáa sjúkur í alifiski, sum eisini fer at smitta villa fiskin. Hendir tað, so er fiskivinnan deyð í Føroyum. Føroyska alivinnan tekur slett ikki fyrilit fyri føroyska umhvørvinum, tað tykist sum føroyska alivinnan í dag bara skal tæna norskum kapitali, sum flytir laks til ES, sigur Jóhan Mortensen.

-Tað er tankavekjandi, at tað er so nógvur norskur kapitalur í føroysku alivinnuni, og síðan gera vit eina avtalu, soleiðis at hesin sami laksurin frá norska kapitalinum skal sleppa inn í ES og so offtar tú alt sum eitur føroykur landbúnaður á hasi kontoini, sigur Jóhan Mortensen.

### Vistfrøðiligar vørur

Jóhan Mortensen heldur tað er skeivt, at føroyingar skulu leggja seg eftir at vera rávøruleverandørur av alifiski til ES marknaðin.

-Føroyska umhvørvið er enn reint og vit skulu heldur leggja okkum eftir at



selja vistfrøðiliga aldan góðskaðan fisk. Smærri nøgdir til nógv hægri prís. Brúkarin á evropeiska meginlandinum fer í framtíðini at krevja nógv meira av vistfrøðiligur vørum.

Vit kunnu lata slíka vørur úr Føroyum, ansa vit eftir náttúruni. Men tað gera vit ikki við verandi rovdrift á føroysku nátturuna trýst fram at útlendskum kapitali.

-Halda vit fram við at koyra fyrilita leyst, so endar galið, tað er ein náttúrlóg. Vit mugu verja alt sum er føroyskt móti sjúku og móti at ovbyrja føroysku náttúruna. Tá hava vit framvegis møguleika at útflyta fisk við vørumerkinum, hann kemur úr heimsins reinasta sjógvi og vit kunnu eisini útflyta landbúnaðarvørur, sum eru framleiddar vistfrøðililiga í heimsins reinastu náttúru, sigur Jóhan Mortensen.

# Innflyta ES tálg til knetti-útflutning

Nýggja fríhandilsavtalan við ES loyvir ikki føroyskum landbúnaðarvørum at verða seldar í Europæiska Samveldinum. Tað vil siga, at skal knettivirkið í Skálavík útflyta knettir til ES, so kann tálg frá føroyskum seyði ikki nýtast. Teir mugu innflyta tálg úr ES, sum møguliga er smittað við alskyns sjúkum, fyri at knettini virkað úr heimsins reinasta fiski, skulu vera góðkend í ES.
*je*

# Skiparin fekk bót

Skiparin á Norðborg, Kristian Martin Rasmussen úr Klaksvík tók við eini bót upp á 15.000 norskar krónur og reiðaríið tók við eini bót upp á 150.000 krónur í Vaadsø í Norðurnoregi mikudagin. Norðborg er nú farin út aftur á lodnuveiðu á gráu leiðini í Barentshavinum.

Norðborg varð tikin týsdagin einar 55 fjórðingar norður úr Vardø. Norska vaktartænastan fór umborð í eini regluligari kanning, og kom fram á at skipið ikki hevði melda til á einum staði, har teir skuldu, samstundis sum signalið til fylgisveinaeftirlitið ikki virkaði sum tað skuldi.

# Fara at útflyta sildreka

Norska stórtingið viðgjørdi fyrst í vikuni eitt uppskot um at seta úr gildi bannið móti at útflyta sildreka. Stórtingið hevur sjálvt sett hetta bann í verk, men nú vil fiskimálaráðharrin Otto Gregussen hava hetta sett úr gildi.

Tað er stórur meiriluti í stórtinginum fyri, at norðmenn skulu seta útflutningsbannið úr gildi, skrivar netsíðan Intrafish. Stórtingið viðgjørdi nógv meira nær teir skuldu byrja upp á útflutningin heldur enn um teir skuldu fara undir hann.

Fyri stórtingslimin og stríðsmannin fyri hvalaveiðu , Steinar Bastesen úr Kystpartiet var tað ein stórur dagur, tá uppskotið kom til viðgerðar.

-Her er talan um eina velduga broyting síðan 1997, tá sama uppskot varð mett sum ein hóttan móti trygdini í landinum.

Bastesen staðfesti eins og aðrir røðarar, at mótmælini høvdu ikki verið nógv, síðan stjórnin tók avgerð um at seta bannið úr gildi 16. januar í ár.
*je*

gult cyan magenta svart



# Kvinnur hava samansetta rúsevnismisnýtslu

**Trupulleikarnir hjá kvinnunum, sum fara í viðgerð fyri misnýtslu, eru samansettir. Hjá flestum teirra stava teir bæði frá rúsdrekka, tablettum og hasj**

MISNÝTSLA
*Turið Kjølbro*

Sløk 300 fólk eru í viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtlsu á teimum tveimum viðgerðarstovnunum um árið. Hetta vísa hagtøl, sum eru at lesa í ársfrágreiðingini hjá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum fyri 1999. Hetta árið vóru í alt 156 fólk í viðgerð á Heilbrigdinum á Velbastað og 130 á Blákrossheiminum í Havn. Á báðum stovnunum er nógv tann størsti parturin menn. Av teimum 156 fólkunum, ið vóru í viðgerð á Heilbrigdinum, vóru bert 23 kvinnur. Á Blákrossheiminum vóru 14 kvinnur.

Eftir øllum at døma eru tað tey tilkomnu, serliga tey 40-50 ára gomlu, sum eru mest útsett. Hyggja vit at hagtølunum fyri Blákrossheimið umfatar hesin aldursbólkurin ikki færri enn 53 fólk ella 40%. Næst størsti bólkur er eisini rættiliga stórur. Hann fatar um tey 50-60 ára gomlu og tey vóru 33 í tali, ella 25 % av samlaða talinum. Við øðrum orðum sæst, at av øllum, ið vóru í viðgerð í 1999 á Blákrossheiminum, vóru ikki færri enn tveir triðingar í aldrinum 40-60 ár. Hinvegin vísa tølini, at eittast, - um tað er rætta orðið at brúka í hesum sambandi, - 8 fólk í aldrinum 20-30 ár vóru í viðgerð í 1999. Hetta er ein minking í mun til 1998, tá 12 í hesum aldursbólki vóru í viðgerð.

### Alkoholpolitikkur munar

Um tað sama ger seg galdandi á Heilbrigdinum, síggja vit ikki í ársfrágreiðingini, tí har er ikki gjørt upp í aldursbýti. Hinvegin síggja vit har, hvønn trupulleika sjúklingarnir hava. Sum vera man er tað framvegis rúsdrekka flest fólk hava trupulleikar av, men rúsevni, tablettir og onnur narkotisk evni hava seinastu árini rættiliga hálað seg inn. Hyggja vit at nýggjastu hagtølunum, teimum frá 1999, vóru 87 fólk í viðgerð fyri rúsdrekkatrupulleikar, 50 fyri rúsdrekka og tablettir, og 39 fyri rúsdrekka, tablettir og hasj. Tølini fyri 1995 fyri somu bólkar vóru ávikavist 86, 63 og 21.

Hagtøl frá Heilbrigdinum fyri øll árini vísa, at trupulleikarnir hjá kvinnunum, sum fara í viðgerð fyri misnýtslu, eru samansettir. Hjá flestum teirra stava teir bæði frá rúsdrekka, tablettum og hasj. Seinastu árini hava tær kvinnur, ið bara hava rúsdrekkatrupulleikar, verið fáar í tali, í 1998 vóru tær 5 og í 1999 eingin.

Hvørji onnur narkotisk evni enn tey, sum hava verið frammi í nógv ár, eru í umfari, fæst ikki at vita í hagtølunum. Tey, ið fara í viðgerð fyri trupulleikar av øðrum narkotiskum evnum, eru framvegis fá, í 1996 vóru tey 9, men í 1999 eingin.

Flestu teirra, sum verða innløgd á Heilbrigdinum, koma ígjøgnum AA-stuðlabólkin, lækna, sjúkrahúsverkið, og familju- og hjúnafelaga. Men sum skilst eru tað fleiri arbeiðspláss sum senda fólk í viðgerð nú enn áður, hetta orsakað av, at fleiri arbeiðspláss hava ein alkoholpolitikk.



*Tveir triðingar av teimum, ið vóru í viðgerð á Blákrossheiminum í 1999 fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, vóru í aldrinum 40-60 ár.*
*Modellmynd*

# Frá bøn til verk

**Adventkirkjan í Havn, Christianskirkjan í Klaksvík og Missiónshúsið í Vági eru karmur um altjóða kvinnubønardagin, sum er í dag**

ALTJÓÐA KVINNUBØNARDAGUR
*Turið Kjølbro*

Fyrsta fríggjadag á hvørjum ári sameinir altjóða bønardagurin kristnar kvinnur úr fleiri enn 170 londum í einum heimsumfatandi felagskapi í bøn og verki. Í hesum sambandi eru Adventkirkjan í Havn, Christianskirkjan í Klaksvík og Missiónshúsið í Vági karmur um bønardagin. Á øllum støðum kl. 19.30.

Í ár eru tað kvinnur í Samoa, sum hava gjørt tilfarið til altjóða kvinnubønardagin. Samoa liggur í Kyrrahavinum og er eitt av heimsins minstu londum. Umleið 99 prosent av fólkinum eru kristin. Samoa er samstundis eitt av heimsins minst mentu tjóðum. Síðani landið gjørdist sjálvstøðugt í 1962, er búskapurin viknaður. Ídnaðurin er lítil, og vøksturin í tænastu- og ferðafólkavinnuni somuleiðis. Nógv fólk úr Samoa búgva og arbeiða í øðrum londum.

Peningurin, sum verður savnaður inn altjóða kvinnubønardagin, fer til trý endamál. Bønardagsnevndin í Litava og kvinnur í Ukraina, ið arbeiða til frama fyri altjóða kvinnubønardagin fáa ein part. Kvinnufelagið í Metodistkirkjuni í Letlandi, sum arbeiðir við børnum og ungum fáa ein part, og ein partur fer til foreldraleys børn í Vilnius í Letlandi.

# Fleiri kvinnur og børn gista á Kreppumiðstøðini

**Í 1999 heittu 409 kvinnur á Kreppumiðstøðina um hjálp mótvegis 5 í 1990**

HARÐSKAPUR
*Turið Kjølbro*

At tað er grundarlag fyri Kreppumiðstøðini í Kvinnuhúsinum, sæst í hagtølunum, sum eru á lesa í ársfrágreiðingini hjá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum. Áheitanirnar frá kvinnum eru tey 11 árini, síðani Kvinnuhúsfelagið varð stovnað, øktar í risalopum, úr 5 í 1990 upp í 409 í 1999. Tilsamans hava 136 kvinnur gist í Kvinnuhúsinum í styttri og longri tíðarskeið síðani húsið lat upp. Flestu teirra koma ikki einsamallar, tí børnini eru líka nógv í tali. Í 1999 eitt nú gistu 17 kvinnur í Kvinnuhúsinum og tær høvdu í alt 25 børn við sær. Bert í 1995 hevur talið verið størri. Tá komu 518 áheitanir frá kvinnum, og tá gistu 18 kvinnur og 24 børn.

Vøkstur er eisini í gistingardøgnunum. Tær 17 kvinnurnar og tey 25 børnini, ið gistu í fjør, vóru har í ávikavist 483 og 751 døgn tilsamans. Til samanberingar kunnu vit taka 1991, tá 12 kvinnur og 5 børn gistu í ávikavist 114 og 17 døgn.

### Sjálvboðið

Kvinnuhúsið hevur tvey lønt fólk í starvi, men virksemið í húsinum annars er grundað á sjálvboðið arbeiði. Tær sjálvbodnu eru allar limir í Kvinnuhúsfelagnum. Felagið hevur støðugan tørv á sjálvbodnum, sum kunnu átaka sær vaktir og taka lut í ráðgevingini.

Endamálið við húsinum er, at gera arbeiði, sum styrkir støðu kvinnunnar, styrkir sjálvkenslu og sjálvsábyrgd hennara, so hon í størri mun sjálv fær styrki at ráða og taka avgerðir yvir egna lívi.

Fíggjarliga grundarlagið undir Kvinnuhúsinum er stuðul frá tí almenna og øðrum.